TAKS




# Avloysarastarv sum málsviðgeri á TAKS

## Vit søkja eftir einum dugnaligum avloysara sum málsviðgeri í eitt ár til Mvg-deildina í Tórshavn.

**Uppgávurnar** hjá viðkomandi verða m.a. at svara fyrispurningum, avgreiða umsóknir og at fara út á eftirlit hjá virkjum runt um í landinum.

Mvg-deildin umsitur lógina um mvg og onnur avgjaldsøkir.

Umsøkjarar til starvið skulu hava útbúgving samsvarandi AÚ innan virkisbúskap. Ítøkiligar royndir innan bókhald og roknskap eru eitt krav. Somuleiðis krevst hollur kunnleiki í føroyskum og enskum.

Kunnleiki til almenna fyrisiting er ein fyrimunur.

Fyri at røkja starvið er umráðandi at duga at arbeiða sjálvstøðugt, og at duga at taka avgerðir og grundgeva fyri hesum við støði í lógarteksti.

Nærlagni, arbeiðssemi og ábyrgdarkensla eru eisini eginleikar, ið vit virðismeta høgt.

**Starvið** verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Starvið er fulltíðarstarv, sum verður sett skjótast gjørligt. Setanarøkið er TAKS í Tórshavn, men umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Eyðun Joensen, deildarleiðara á Mvg-deildini, á telefon 352600 ella á telduposti eyjo@taks.fo.

**Send umsókn**, avrit av prógvum, ummælum og CV til TAKS í seinasta lagi 24. oktober 2014. Merkt: Umsókn Mvg-deildin.

TAKS, Postsmoga 2151, FO-110 Tórshavn, T-postur: taks@taks.fo

www.taks.fo